

## Rentan lækkar 0,75%

Greinarar hjá Den Danske Bank og Handelsbanken meta nú, at europiska rentan lækkar í summar og í heyst. Áður hava fíggjargreinararnir hjá Danske Bank annars mett, at eingin rentubroyting var í eygsjón fyrr enn í heyst, men tann metingin er nú broytt. Veik europisk lyklatøl, vánalig útlit á amerikanska marknaðinum og bleyta ECB-útmeldingin eftir rentufundin í seinastu viku eru høvuðsorsøkirnar til broyttu metingarnar, skrivar danska epn. dk. Mett verður, at talan helst verður um tríggjar rentubroytingar í ár. Og at hesar í juni, september og desember hava við sær, at leiðandi rentan íalt fellur tríkvart prosentstig innan árslok.




# Viðingar sleppa aftur til

**- Hugskotið um ein handil kom ein dagin eg lá í sofuni. So segði eg við mannin: "Gundur, nú fara vit í gongd!", sigur 37 ára gamla Óluva Frederiksen á Viðareiði. Um tríggjar mánaðir verða orðini til veruleika, tá nýggjur matvøruhandil letur upp á Viðareiði.**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*



*- Eg ynski at gera tað so, at fólk ikki bert koma til handils at keypa, men eisini kunnu steðga eina løtu til eitt prát, sigur Óluva Frederiksen*

**Viðareiði:** - Nei, eg havi ikki hugsað um nakað navn enn. Men handilin skal í øllum førum ikki eita "Handilin hjá Óluvu"!, sigur komandi handilskvinnan, sum annars er ættað úr Klaksvík.

Sum heimahoyrandi í hesi norðastu bygd okkara veit hon alt um trupulleikarnar, tá fólk skulu til handils.

Langt er at fara til handils í Klaksvík, og so má ein haraftrat hugsa um, at koyrast skal eftir tí smala og ótíðarhóskandi Viðareiðisvegnum og gjøgnum smølu tunlarnar á Borðoynni, - kanska bara fyri at keypa sær ein pakka av mjólk.

Hugskotið til handilin fekk hon ein dagin fyri skjótt 10 mánaðum síðani, og í løtuni byrjar ein handilsbygningur at taka skap á Viðareiði. Alt er innilokað og ein av fyrstu døgunum verða vindeyguni sett í.

- Jú, eg eri øgiliga spent eftir at byrja, sigur Óluva.

Ætlanin er eisini at gera umstøður, so at ferðafólk kunnu sita uttanfyri í góðveðrinum og njóta útsýnið yvir vøkru bygdina.

### Ov langt at koyra

Tað var við sorg í sinni, at fólkið á Viðareiði kundi staðfesta, at einasti handilin í bygdini ætlaði at lata aftur.

Tíðindini um hetta høvdu gingið í eina tíð, og í november 2006 var so dagurin umsíðir komin, tá viðingar ikki sluppu til handils longur.

Teir noyddust nú at fara av bygdini um teir skuldu keypa sær eitthvørt til húsarhaldið. Og í flestu førum merkti hetta aftur, at tey máttu koyra allan vegin til Klaksvíkar.

- Eg skilti tá, og hoyri tað enn, at fólk hava longst eftir einum handli í bygdini. Tað er ov langt at koyra 16 kilometrar hvønn vegin til Klaksvíkar, bara tí ein manglar eitt smáting!, staðfestir Óluva.

> *Tað er ov langt at koyra 16 kilometrar hvønn vegin til Klaksvíkar, bara tí ein manglar ein mjólkapakka*

Á Viðareiði er eitt hotell, matstova og ein kiosk, men her fæst ikki alt tað, sum krevst til eitt vanligt húsarhald.

Men gongst sum ætlað fáa viðingar og onnur høvið at fara til handils aftur í bygdini um einar 2-3 mánaðir.

### Kaffikrók við útsýni

Óluva Frederiksen er í teirri hepnu støðuni, at hon er systir ein mann við góðum hugflogi – Niclas Hera í Klaksvík.

Tey hava tosað nógv saman, og hann hevur eisini verið arbeiðsgevari hennara, tá hon áður arbeiddi á bensinstøð í Klaksvík.

Í handlinum á Viðareiði fer tí at verða annað og meiri enn bert ein handil. Hetta skal eisini verða eitt sosialt stað – eitt stað, har fólk kunnu hittast til eitt hugnaligt prát.

Ætlanin er nevniliga at hava ein kaffikrók í tí horninum, sum vendir oman ímóti kirkjuni. Her kunnu so bygdarfólk ella fremmandafólk fáa sær ein kaffimunn, meðan tey práta um dagsins viðurskifti, samstundis sum tey kunnu njóta vakra útsýnið vestureftir.

- Vit mugu eisini taka hensyn til tann sosiala partin. Tað er ikki neyðugt hjá fólki at skunda sær avstað aftur, tá tey hava keypt tað sum tey skulu.

- Hetta veit eg alt um, tí eg havi mangan hoyrt fyri tað, at eg ikki kom til hús aftur, tá eg fór til handils!, sigur Óluva við einum brosi.

### Opið út á kvøldið

Óluva hevur roynt ymisk arbeiði. Hon hevur millum annað verið dagrøktarmamma og hevur arbeitt hjá Shell í Klaksvík, eins og hon nú vaskar í skúlanum á Viðareiði.

Nú, hon letur handilin upp, ætlar hon sær sjálv at standa í handlinum ta fyrstu tíðina í øllum førum.

- Men sjálvandi má eg so líðandi fáa onkran at hjálpa mær, greiðir hon frá.

Ætlanin er at handilin, sum enn ikki hevur fingið sítt navn, skal hava opið frá fyrrapartinum og nakað út á kvøldið – kanska til 8 ella 9.

Hetta seinasta verður serliga til fyrimunar hjá teimum sum arbeiða í Klaksvík, og sum eftir loknan arbeiðsdag skulu gera døgurða til familjuna.

- Um tey brádliga mangla okkurt, er ov langt at fara allan vegin til Klaksvíkar at keypa. Tá kunnu tey bara koma til mín at keypa, sigur Óluva.